

# Nýggj norsk útbjóðing

**Jan Müller**

04.04.2014 - 10:32

Oljan.fo

Norska olju- og orkumálaráðið kunnger í dag ársins útbjóðing av búnum leiðum á landgrunninum, og gongst sum ætlað, verða útvinningarloyvini latin tíðliga næsta ár.

-TFO-skipanin er ein av hornasteinunum í norska oljupolitikkinum. Hon hevur viðvirkað til munagóða kanning av stórum pørtum av norska økinum og hevur havt avgerandi týdning fyri tey stóru virðini, sum leitivirksemið hevur skapt tey seinastu árini, sigur Tord Lien, olju- og orkumálaráðharri.

TFO-útbjóðingin í ár er víðkað við seks blokkum í Norskahavinum nærhendis Aasta Hansteen-leiðini og trimum blokkum í Barentshavinum tætt við Snøhvit-leiðina.

Freistin at søkja er týsdagin 2. september 2014 á middegi norska tíð.

Skipanin við at bjóða út útvinningarloyvi á búnum leiðum er frá 2003 og umfatar teir partarnar av landgrunninum, sum eru best lýstir jarðfrøðiliga. Yvirhøvur er talan um smá fund, sum ikki eru búskaparliga lønandi, um tey standa einsamøll, men sum kunnu vera lønandi, um tey verða knýtt at verandi infrakervi